## Ullrich fer eftir sigrinum

Týski Jan Ullrich sigur, at hann í ár er betri fyri, enn hann nakran tið hevur verið undan Tour de France súkklukappingini.

– Eg kenni á mær, at eg nú eri uppi á 95% av toppforminum, og ikki 80%, soleiðis sum eg annars plagi at vera um hesa tíðina.

Ullrich vann Tour de France í 1997, men síðani hevur gingið striltið við at halda somu hæddirnar. Ikki minst tí hann ofta hevur lyndi at fáa dekan ov nógv kilo upp á kroppin vetrarmánaðirnar.

**-mørk**

## Grønkjær til FCK

Ein av fremstu donsku fótbóltsspælarunum seinnu árini, Jesper Grønkjær, fer nú at spæla við FCK. 28 ára gamli kantspælarin hevur síðani 1998 spælt við feløgunum sum Ajax, Chelsea, Birmingham, Atletico Madrid og VfB Stuttgart, men nú gongur leiðin so aftur til Danmarkar.

– Eg havi hugsað um hetta í eina tíð. Skuldi eg aftur til Danmark, so var løtan tann rætta, haldi eg. Og FCK er jú størsta felagið í Norðanlondum, so eg ivaðist sum ikki, hvar eg vildi spæla, segði Jesper Grønkjær á tíðindafundi.

**-mørk**

# Nógvar koyrivillur í Kanada

**Royndir sum óroyndir bilførarar koyrdu útav, snaraðu runt og summir brutu enntá bilar sínar, tá kanadiska formel 1 kappingin varð koyrd sunnukvøldið**

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Juan Pablo Montoya hevði ein alt annað enn góðan dag. Eftir at hava verið eina ferð í pittinum, noyddist hann longu at gevast í triðja umfarinum, tá hann rendi bilin á veggin kring koyribreytina*

*Mynd: Scanpix*

Hóast Fernando Alonso ikki veruliga varð avbjóðaður á veg til sigurin í kanadisku formel 1 koyringini, so var koyringin bæði spennandi óvanlig og hendingarík. Men fyri heimsmeistaraheitið hvørvur spenningurin spakuliga fyri hvørja koyring, ið fer afturum. Við níggju koyringum eftir er spaniumaðurin 25 stig framman fyri Michael Schumacher.

Byrjanin var sera hendingarík, Giancarlo Fisichella tjóvstartaði av øðrum plássi og fangaði seg sjálvan í tí, í eini roynd í at steðga aftur, fekk hann eina sera ringa byrjan har Räikkönen fór framvið honum, harafturat førdi tjóvstarturin til eina gjøgnumkoyringar revsing, ið sendi hann fleiri støður aftur.

Eisini Michael Schumacher fekk eina ringa byrjan, tá bæði Nico Rosberg og Juan Pablo Montoya fóru framvið honum. Kappingin millum hesar báðar var sera hørð, og áðrenn fyrsta umfar var av høvdu teir rent saman, soleiðis at Rosberg gavst á staðnum og Montoya mátti í pitt at skifta gron á bilinum. Montoya endaði tó við at renna á veggin og bróta bilin á 13. umfari.

Eisini teir báðir Midland koyrarnir flættaðu hjól á fyrsta umfari, meðan Albers gavst á staðnum, noyddist Monteiro í pitt at skifta gronina.

Koyringin var merkt av nógvum koyrivillum, bilar koyrdu alla tíðina útav, og ikki færri enn 8 bilar góvust áðrenn tíð. Eitt nú vóru Schumacher brøðurnir millum teir koyrarar, ið vóru oftast av breytini.

Tá heimabreytsfavorittúrin Jaques Villeneuve koyrdi á veggin við 8 umførum eftir, kom trygdarbilurin triðju ferðina á breytina, og feltið varð savnað. Hetta skapti nøkur spennandi umfør, har m.a. Michael Schumacher tók annað pláss frá Kimi Räikkönen, og Coulthard tók seinasta HM stigið frá Jenson Button.

### Úrslitið av koyringini í Kanada

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | Renault |
| 2 | Michael Schumacher | Ferrari |
| 3 | Kimi Räikkönen | McLaren-Mercedes |
| 4 | Giancarlo Fisichella | Renault |
| 5 | Felipe Massa | Ferrari |
| 6 | Jarno Trulli | Toyota |
| 7 | Nick Heidfeld | Sauber-BMW |
| 8 | David Coulthard | RBR-Ferrari |
| 9 | Jenson Button | Honda |
| 10 | Scott Speed | STR-Cosworth |
| 11 | Christian Klien | RBR-Ferrari |
| 12 | Mark Webber | Williams-Cosworth |
| 13 | Vitantonio Liuzzi | STR-Cosworth |
| 14 | Tiago Monteiro | MF1-Toyota |

### Komu ikki í mál

| | |
|---|---|
| - Takuma Sato | Super Aguri-Honda |
| - Ralf Schumacher | Toyot |
| - Jacques Villeneuve | Sauber-BMW |
| - Juan Pablo Montoya | McLaren-Mercedes |
| - Rubens Barrichello | Honda |
| - Franck Montagny | Super Aguri-Honda |
| - Christijan Albers | MF1-Toyota |
| - Nico Rosberg | Williams-Cosworth |

### Støðan í HM fyri bilførarar

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | Spania | 84 |
| 2 | Michael Schumacher | Týskland | 59 |
| 3 | Kimi Räikkönen | Finnland | 39 |
| 4 | Giancarlo Fisichella | Italia | 37 |
| 5 | Felipe Massa | Brasilia | 28 |
| 6 | Juan Pablo Montoya | Kolumbia | 26 |
| 7 | Jenson Button | Ongland | 16 |
| 8 | Rubens Barrichello | Brasilia | 13 |
| 9 | Nick Heidfeld | Týskland | 12 |
| 10 | Ralf Schumacher | Týskland | 8 |
| - | David Coulthard | Skotland | 8 |
| 12 | Jaques Villeneuve | Kanada | 7 |
| 13 | Mark Webber | Avstralia | 6 |
| 14 | Nico Rosberg | Týskland | 4 |
| 15 | Jarno Trulli | Italia | 3 |
| 16 | Christian Klien | Eysturríki | 1 |

### Støðan í HM fyri lið

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Renault | 121 |
| 2 | Ferrari | 87 |
| 3 | McLaren-Mercedes | 65 |
| 4 | Honda | 29 |
| 5 | Sauber BMW | 19 |
| 7 | Toyota | 11 |
| 6 | Williams-Cosworth | 10 |
| 8 | Red Bull Racing Ferrari | 9 |

## Tann yngsti snávaði móti tí elsta

TALV
*tíðindaskriv*

Í fyrsta umfari av Suðuroy International 2006, uppstóð klassiska stríðið millum ungu leyvuna og gamla revin, tá 16 ára gamli Helgi Dam Ziska kiksaði móti aldursforsetanum í kappingini, Bjørn Brink Claussen

Í eini støðu, tá Helgi ikki sá út til at hava stórvegis trupulleikar, kom hann sær út í eina drepandi binding, tá valdi hann eitt skeivt avbýti. Bindingin førdi við sær, at Helgi misti mann og stutt eftir alt stigið móti Bjørn Brink Claussen. Ein keðilig byrjan fyri næsta IM aspirant føroyinga.

Suðuroy International var annars sett í dag á Jóansøku í Vágs skúla av Rana Nolsøe, fyriskipara og Kirstin Strøm Bech, borgarstjóra.

Lutakastið førdi til tvær 'føroya-uppgerðir' longu í fyrsta umfari. Hans Kristian Simonsen, sum vann sítt talv trygt móti Sjúrða Thorsteinssyni, og millum John Rødgaard og John Arna Nilssen, sum tóku av javnleiki, áðrenn talvið veruliga varð byrjað.

Uttan nakran slingur í valsinum streyk ratingfavoritturin og danin Simon Bekker Jensen av stað við tí fulla stiginum móti landsmanninum Per Andreassen.

Tá hjúnini Lenka Ptacnhikova og Omara Salama tóku ein skjótan javnleik sína millum, er støðan í Suðuroy International 2006 nú eftir fyrsta umfar:

| | | |
|---|---|---|
| 1 | IM Simon Bekker Jensen | 1/1 |
| 1 | IM Bjørn Brinck Clausen | 1/1 |
| 1 | Hans Kristian Simonsen | 1/1 |
| 4 | IM John Arni Nilssen | 0,5/1 |
| 4 | IM John Rødgaard | 0,5/1 |
| 4 | WGM Lenka Ptacnhikova | 0,5/1 |
| 4 | Ísl, Omar Salama. | 0,5/1 |
| 8 | FM Per Andreassen | 0/1 |
| 8 | Helgi Dam Zisk | 0/1 |
| 8 | Sjúrður Thorsteinss. | 0/1 |